NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 4.-11. september 1996

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*September 4$^{th}$ -11$^{th}$ 1996*

Eyðfinn Magnussen




NVD*Rit* 1996:2

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka**
**4.-11. september 1999**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*September 4th -11th 1996*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

NVD*Rit* 1996:2
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk við frá FRS:** Marit, Dagun og Eyðfinn

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var, at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiini, serliga vøkstri og føði, hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini vórðu CTD, glúp og vatnprøvar tyknir

Endamálið við túrinum var rokkið, tó vóru í minna lagi av magum (serliga upsa) tiknir á Føroyabanka. Hetta komst av, at ov lítið av fiski var fingið.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m, CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið var av Havnini 5/9 á kl.24.00. Fyrsta hálið var á Føroyabanka 6/9 kl. 08.43. Seinasta hálið var 10/9 kl. 12.24. Túrurin samsvaraði við ætlanina, undantikið punt 18-72. Hesin puntur varð ikki tikin. Í hesum hálinum kom trolið fast í botn og fór í knús. Fyri at verða inni til tíðina var hendan støðin tí droppað.

**Prøvataking:** Á Føroyabanka vóru tiknar 29 trolstøðir:

Á støðunum vórðu hesir magar tyknir:

| Fiskaslag | | Tal |
|---|---|---|
| Toskur | | 131 |
| Hýsa | | 110 |
| Upsi | | 19 |
| Blálonga | | 24 |
| Gulllaksur | | 25 |
| Kalvi | | 12 |
| Kongafiskur, | Stóri | 6 |
| | Trant | 1 |
| Havtaska | | 3 |
| Mathøgguslokkur | | 20 |
| Havmús | | 20 |
| Knurrhani | | 6 |
| Tilsamans | | 377 |

Tal av nytrum tiknar á túrinum:

| | |
|---|---|
| Toskur | 209 |
| Hýsa | 179 |
| Upsi | 19 |
| Gulllaksur | 25 |
| Kalvi | 9 |
| Blálonga | 51 |
| Knurrhani | 6 |
| Brosma | 1 |
| Havtaska | 3 |
| ====================== | |
| Tilsamans | 502 |

Á Føroyabanka vóru tiknar 12 CTD, WP-glúp og vatnprøvar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Nytrarnar verðastoypta og lisnar skjótast gjørligt. Magainnihaldið verður sorterað seinri í ár.

**Fyribils úrslit:** Í viðløgdu puntakortinum sæst, hvussu veiðan var í teimum ymisku puntunum fyri tosk, hýsu og upsa (mynd 1-3). Í Talvu 1-3 sæst, hvussu veiðan hevur verið í teimum ymisku puntunum síðani 1983.

**Toskur** var fingin á øllum uttan einari støð innan fyri 200 m (Strata 17). Hettar er eitt 89sindur øðrvísini enn undanfarnu á, tá toskur næstan bert hevur verið at fingið á teimum grynstu støðunum. Veiðan í teimum flestu puntunum var yvir miðal. Hóast hettar, var tað samlaða miðalveiðan fyri túrin 299 kg pr hál móti 506 kg pr hál á vári 1996. Tann hægra miðalveiðan kemst av einum stórum háli uppá sløk 4.000 kg á vári 1996. Eisini støddarbýtið var eitt sindur øðrvísi enn undarfarin ár, tá bert stórur toskur (90-100 cm) var at fáa. Henda túrin vóru eini 20-30 smáfiskar (uml. 20 cm til longdar) fingnir. Hettar havi eg ikki sæð fyrr á Bankanum.

Nógv av **Hýsu** var at fáa. Hon fekst allastaðni. Støddin var um 50 cm. Veiðan í flestu puntum var yvir miðal. Tann samlaða miðalveiðan fyri túrin var 190 kg pr hál, móti 145 kg pr hál á vári 1996.

Lítið av **upsa** var at fáa. Veiðan í 27 av 28 puntum var minni enn miðal. Samlaða miðalveiðan fyri túrin var 5.5 kg pr hál, móti 14,8 kr pr hál á vári 1996. Minkaða veiðan av upsa er hevur veri allastaðni kring Føroyar.

Eyðfinn Magnussen